

*- Tað skulu stórar maskinur takast í nýtslu, umframt vanligu klíparanar og kustarnar, fyri at fáa havnargøtur reinar aftur á ólavsøku, sigur Jørmund Olsen er sjakkleiðari hjá Reinhaldinum hjá Tórshavnar kommunu. Á ólavsøku eru tey útvið 60 fólk sum rudda um morgnarnar*

# 60 fólk rudda

**Tað er eitt stórt arbeiði at taka upp eftir øllum ólavsøkugestunum, sum leita sær til Havnar. – Vit noyðast at arbeiða, meðan fólk framvegis eru í býnum, men fólk eru í góðum lag, so tað gongur fínt. Men tað er eitt stórarbeiði, sigur Jørmund Olsen hjá reinhaldinum**

Eydna Skaale • Myndir: Jens Kristian Vang

- Eg havi ikki hildið ólavsøku síðani 92'. Hvørt einasta ár, síðani eg byrjaði í reinhaldinum, havi eg ruddað eftir ólavsøkugestunum, sigur Jørmund Olsen, sum er sjakkleiðari í Reinhaldinum hjá Tórshavnar kommunu.

- Mín ólavsøka er ein túrur gjøgnum býin við familjuni um dagin. Eg kann jú ikki fara ov seint í song, tí eg skal møta til arbeiðis kl 04. So tað er einki ólavsøkuhald, sum so.

Jørmund greiðir frá, at teir hava stór og dýr tól, sum teir rudda við, so teir mugu vera væl fyri og klárir í høvdinum, tá teir koma til arbeiðis. So tað er einki við at fara beinleiðis úr býnum og til arbeiðis.

## Nógv eyka fólk

- Vit plaga at byrja at rudda og skimma umleið ein mánað fyri ólavsøkuna. Men nú hevur drotningin akkurát verið her, so nú er tað mesta, sum vit plaga at gera til ólavsøku, longu ordnað, greiðir Jørmund Olsen frá.

Hann sigur, at ruddararnir hjá kommununi bæði taka ókrút, spula, vaska, rudda og shina alt upp, so tað verður nossligt og pent í miðbýnum í Havn. Einir tríggir ella fýra menn arbeiða við gera klárt til ólavsøkuna, men tá ólavsøkan er sett, krevur ruddingin fleiri kreftir. 40 ungfólk verða tí sett til arbeiðis, og harumframt læna teir arbeiðsfólk frá øðrum deildum hjá kommununi.

- Vit møta kl 4 um morgunin, og so eru vit til arbeiðis til umleið kl 12. Tá má alt verða ruddað aftur, tí tá verður skrúðgonga og nógv fólk í býnum.

- Men tá vit byrja at rudda, er framvegis fult av fólki í býnum, so vit plaga at byrja á økjunum uttanfyri miðbýin, og so arbeiða okkum inn ímóti Áarvegnum, har nógv tað mesta óruddið er, greiðir Jørmund frá.

Ruddararnir býta seg upp í 4 lið. Fýra ruskbilar eru, og teir hava so 10 ungfólk afturat sær. Eitt lið byrjar á keiini, eitt uppi í Gundadali, eitt á SMS-vegnum og eitt lið byrjar á Skálatrøð.

- Vit plaga at senda ungdómarnar út fyrst, soleiðis at tey kunnu taka tað grova upp, so tað ikki oyðileggur maskinurnar. Tey feiða, taka upp og koyra uppí ruskbilarnar, og síðani koma sópimaskinurnar, sigur Jørmund.

## Stórarbeiði

Jørmund heldur, at óruddið versnar, sum ólavsøkan líður. Tá konsertin er, er nógv upptak, men síðani versnar tað dag fyri dag, inntil ólavsøkan er liðug.

- Eg veit ikki hví, fólk órudda so øgiliga illa. Men orsøkin er ikki, at ruskíløtini standa tóm. Øll ruskíløtini verða fylt fleiri ferðir um dagin, og vit tøma tey so hvørt. Men út á morgunin órudda fólk heilt klárt verri enn um dagin, heldur Jørmund.

Men hóast ruskíløtini verða nýtt, so er eingin ivi um, at tað er eitt risa arbeiði at rudda aftur eftir gestunum.

- Tað plagar at taka okkum eina góða viku at rudda aftur eftir ólavsøkuna, og tað er eitt stórarbeiði. Allar ristirnar mugu tømast, tí fløskur og órudd fer niðurímillum allastaðni, og um tað ikki verður tikið skjótt, fer alt at lukta, greiðir Jørmund frá.

## Fólk ringja og sóknast

Tað kemur meiri enn so fyri, at ruddararnir finna virðismikil ting, sum kátu gestirnir hava mist. Bæði brosjur, spenni og aðrar lutir av føroyska búnanum. Men eisini pengamappur og annað, sum hevur virði, liggur millum fløskubrot og tóm poppkorníløt.

- Fólk ringja ofta til okkara, fyri at vita um vit hava funnið okkurt, tey hava mist. Onkuntíð hava tey verið heppin og hava fingið tað aftur, tey sóknast eftir. Men tað, sum eingin sigur seg sakna, verður latið politistøðini.

Ruskið er tað tó eingin, ið saknar. Og fá geva sær far um, hvussu stórt arbeiði tað í grundini er, og hvussu nógv fólk eru í sving, fyri at fáa alt at síggja pent út aftur eftir so stuttari tíð.